

www.oljan.fo

**Jan Müller** 26 - 05 - 2012

# Upphøgging av oljupallum kann gerast týðandi vinna í Hetlandi

Nú oljuvinnan í Norðsjónum skjótt hevur fimti ár á baki og olju- og gasskeldur eru við at tømast er tíðin komin til at taka niður aftur pallar og ymsan útbúnað á havbotninum til upphøggingar. Her er í veruleikanum talan um ein sera stóran ídnað, sum kann geva nógv arbeiðspláss. Hetta hevur fingið skotsku stjórnina við Alex Salmond á odda at seta 100 milliónir krónur í ein grunn, sum skal stuðla upphøggingarídnaðinum í eitt nú Hetlandi. Norska AF Group leggur í løtuni til ræ ttis eina ætlan at byggja eina djúpvatnskei í Lerwick í samstarvi við lokalar myndugleikar og skotsku stjórnina. Hetta fer at skapa møguleikar fyri at kunna flyta gamlar oljupallar til Hetlands at verða tiknar sundur. Upphøgging av gomlum oljuútbúnaði er longu ein týðandi ídnaðargrein í eitt nú Noregi og nú verður miðjað móti at gera Hetland til miðstøð fyri slíkum arbeiði eisini. Mett verður at upphøgging av oljuútbúnaði kann gerast ei sera týðandi ídnaður í Hetlandi og Skotlandi. Hetland liggur sera væl fyri til slíkt arbeiði, og tí hevur skotska stjórnin gjørt av at seta pengar av í grunn, sum skal skunda undir bygging av eitt nú keium til endamálið.